Fyrrverandi rúsevnismisnýtari:

# – Bleiv eg ikki tikin, varð

**Tað var um reppið, at ein nú 25 ára gamal maður úr eini miðalstórari føroyskari bygd, doyði av síni rúsevnismisnýtslu fyri nøkrum árum síðani. Men tá ið maðurin var longst úti í misnýtsluni, bleiv hann tikin av løgregluni fyri sølu av rúsevnum, og tað bjargaði lívinum hjá honum**

RÚSEVNISMISNÝTSLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hann líkist øllum øðrum ungum føroyskum monnum, hesin 25 ára gamli maðurin, sum vit hitta ein regnvátan seinnapart í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Um tú ikki visti betur, hevði tú aldrin gitt, at talan var um ein mann, sum fyri fáum árum síðani livdi á lívsins egg.

> „ *– Eg fór frá hash til amfetamin og ecstacy, og tá ið eg var longst úti, brúkti eg fyri umleið 20.000 krónir um vikuna í rúsevnum*

### Brúkti fyri 20.000 krónur um vikuna

Sum hjá so mongum øðrum misnýtarum byrjaði misnýtsla hjá tí 25 ára gamla, sum tá var búsitandi í einum minni býi í Danmark, við einari einkultari pípu av hash. Men so líðandi vaks misnýtslan, og evnini, ið hann nýtti, gjørdust harðari.

– Tað byrjaði ógvuliga ósekt, men tað vant skjótt upp á seg. Eg fekk fótin inn um í hasum umhvørvinum, og so gekk tað bara ein veg. Eg fór frá hash til amfetamin og ecstacy, og tá ið eg var longst úti, brúkti eg fyri

> „ *– Bleiv eg ikki tikin, varð eg deyður í dag, tað er vist. Eg kom inn at sita, og samstundis bleiv eg sendur í viðgerð fyri mína misnýtslu, og eg bleiv avrúsaður. Hevði eg ikki komið inn at sita, hevði eg í dag verið deyður av míni misnýtslu*

umleið 20.000 krónir um vikuna í rúsevnum, greiðir ungi maðurin frá.

Fyri at fíggja ovurhonds stóru nýtsluna av rúsevnum, gjørdist tann ungi føroyingurin meiri og meiri kriminellur, og hann bleiv blandaður upp í søluna av amfetamin og ecstacy í býnum, sum hann tá búði í.

– Eg noyddist at skaffa mær pengar, so at eg kundi keypa rúsevnir. Eg gjørdist tí eitt nú sendiboð hjá teimum stóru pusharunum í býnum. Tað vil siga, at eg flutti rúsevnini frá seljara til keypara, og tað fekk eg so pengar afturfyri, greiðir hann frá. Ungi maðurin leggur afturat, at hann eitt skifti seldi rúsevnir fyri yvir 100.000 krónur um mánaðin.

### Hvørki át og drakk

Stóra nýtslan av rúsevnum setti síni eyðkenni á støðuna hjá tí unga manninum, sum gjørdist alsamt verri fyri likamliga.

– Eg livdi bara av rúsevnum. Eg át kanska eina hálvan sandwich um vikuna og drakk tvær fløskur av kakaomjólk. Annars livdi eg bara í einum ævigum rúsi, og kroppurin hjá mær bleiv spakuliga uppetin, sigur hann. Sum dømi um vánaligu likamligu støðuna, nevnir ungi maðurin, at hann eitt skifti vigaði einans 59 kilo í mun til tey gott og væl 80 kiloini, ið hann vigar í dag, nú hann er rúsfríur.

Lívið við rúsevnum og kriminaliteti hevði eisini sínar avleiðingar fyri sambandið við vinir og familju hjá tí unga manninum.

– Eg útnyttaði familjuna hjá mær fyri at fáa pengar til rúsevnir, og mínir gomlu og sannu vinir fullu frá, tí eg bara kom saman við fólki úr rúsevnisumhvørvinum. Misnýtslan hjá mær kostaði mær nógvar góðar vinir, og eg havi eisini oyðilagt sambandið við ein stóran part av familjuni hjá mær á henda hátt, so tað hevur



*25 ára gamli maðurin hyggur út gjøgnum vindeyga og eygleiðir gerandisdagin uttanfyri. Skjótt verður hann latin leysur eftir drúgva tíð handan rimar, og tað er ikki sørt, at hann stúrir fyri at fara út millum fólk aftur.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*